# EYSTUROYAR DANSIFELAG

Tann 26.sept. 2016

**Skráin 2016-2017**

Vit halda til í **Hæddini, Saltangará**, vanliga **fríggjakvøld** kl 21.00 til út móti midnátt.

Í vetur leggja vit doyin á Finnbogarímu, Guttormsvísu og fyrsta part av Runsivalsstríðnum Vit vóna sjálvandi, at nógv, sum ikki er nevnt í skránni, verður kvøðið. Eisini er nýggir skiparar vælkomnir, eldri sum yngri. Ps. Norskuløvu ætla vit at minna okkum á eisini meir enn einaferð.

Tað mesta er at finna greitt uppsett í kvæðabók okkara á **eystdans.dk** og í kvæðabókum: ANT (Fær. Anthologi), DKF (Danske kæmpe- og folkeviser), GSF (Grør so fagurt), NK 1 og 2 (Nýggja kvæðabókin) og STF (Stígum fast).

**Vertir** hava vit sett uttan at spyrja; annars taka vit øll eina hond í – eisini mannfólkið.

21/10 Hin føroyski dansurin, NK1. Ivan.<br>
Jómsvíkingar, STF. Sámal P.<br>
Guttorms vísa (Der hersked en konge), 9 ør. eystdans.dk. Ivan.<br>
Vertir: Margretha og Marita D.

28/10 Finnbogaríma, til 23. ørindi, kopi – og okkara facebook-bólkur. Anfinnur.<br>
Seyðamaðurin á Sondum, NK 2, Andras. Vertir: Jónhild og Erla.

04/11 **Barnadansur**, kl. 20-21. So nógv vaksin sum møguligt møta.<br>
Guttorms vísa, 10-19 ørindi, Ivan.<br>
Runsivalsstríðið, til 21. ørindi, eystdans.dk. Leivur og Karstin.<br>
God nat og farvel, eystdans.dk. Andras. Vertir: Pálin og Alvira.

11/11 **Brúðardansur.** Várharra hann segði,Ivan; Leivur Øssursson, Sámal Petur; Fisken, Andras; Harra Pætur og Elinborg, Kathrina; Kong Hans, Joen Carl.<br>
Dansispøl, Joen Carl. Vertir: Kathrina og Marjun.

18/11 **Frá Noregs-túrinum,** stutt frágreiðing.<br>
Guttormsvísa, 20. ørindi og út. Ivan.<br>
Hafburd konge, fyrra helvt, DKF. Joen Carl. Vertir: Anna Maria og Marita P.

26/11 **Leygarkvøld kl. 19.00. Tøkum Lætt** vitjar. Vit taka ein steðg at eta smurt breyð kl. 21.00 og kvøða til vit eru móð. Veðrur fæst til keyps.<br>
Brúsajøkil, eystdans.dk. Hans P.<br>
Norska løva, Kathrina.<br>
God nat og farvel, eystdans.dk. Andras. Vertir: Nevndin.

02/12 **Á Strondum**, í Pensjonistahúsinum, Heygsstøð 3.<br>
Torkilsdøtur, GSF. Jóna.<br>
Finnbogaríma, til 23. ørindi. Anfinnur. Vertir: Kára og Jóna.

09/12 **Táttakvøld**: Vit kvøða stutt og lætt: Mimirstátt, Ole Morske, Snorkus, Bukkutáttin og annað gott. Vertir: Sonja og Esther.

06/01-17 Finnbogaríma, 24. ørindi og út. Anfinnur.
Hafburd konge, seinna helvt. Joen Carl. Vertir: Simona og Turid.

13/01 **Í Glyvra Hanusarhúsi, Norðragøtu.**
Harpuríma, GSF, Anna og Sanna.
Eitt sindur um Karlamagnus: upplestur.
Runsivalsstríðið, til 32. ørindi. Leivur og Karstin. Vertir: Anna og Sanna.

20/01 **Aðalfundur**, skrá eftir lógini.
Guttormsvísa øll. Ivan.
Skrímsla, til 24 ørindi. Hans. Vertir: Helena og Anna J.

27/01 **Barnadansur** kl. 20.00
Skrímsla, 25.-ørindi og út. Hans.
Finnbogaríma, 24. ørindi og út. Anfinnur. Vertir: Sunneva og Elsa.

03/02 Vit fara til **Haraldssunds**. Felagið leigar buss: úr Hæddini kl. 21.00, steðga á vanligum støðum. Farið verður til hús kl. 02.00 – ella kl. 02.30, um dansurin er góður.
Hans leggur fyri við Blakman konge. Tiltakið kostar kr. 100,- fyri hvønn.

10/02 Tjúgundi biðil, allur, Anfinnur.
Runsivalsstríðið, til 46. ørindi. Leivur og Karstin.
Guttormsvísa øll. Ivan. Vertir: Jenny og Poula J.

17./02 **Hugnakvøld** kl. 20.00 – ræst kjøt og súpan. Kostn. kr. 150,- Tekning. Syngja úr Føroya fólks; burturluting. Meir kunning seinni.
Huldugentan, eystdans.dk. Helena.

24/02 Vit minna okkum á ein góðan dansivetur. Vertir: Jens og Marita.

**Nýggjárskvøld** og **fastalávints mánakvøld** er opið kl. 21-00.30, og tá gjalda vit atgongumerki, kr 50,-.

Umframt okkara tvey **barnadansikvøld** skipa foreldur fyri barnadansi í Losjuni í Gøtu mikukvøld kl 19.00 -20.00. Vit stiðja tey og ráða til, at foreldur fara hagar við børnum. Tey hava ein bólk á Facebook: **Føroyskur dansur fyri børn.**

**Kunning** fáa limirnir í e-posti og á heimasíðu okkara **eystdans.dk**, (tá hon riggar aftur), har kvæðabókin eisini er. Tey, sum ikki hava e-post, fáa bræv. Á **Facebook** er **Eysturoyar dansifelag**. Har kunnu øll gerast limir – og vælkomin at viðmerkja. Har kunna vit eisini.

**Limagjaldið** fyri 2016, kr. 100,- verða limirnir bidnir um at flyta – helst ikki seinni enn 1. nov. – á konto í **BankNordik 6460 407 961 4** Viðmerking við gjaldi: egið navn/nøvn. Einki annað!
Set kross, tá goldið er ☐

*Felagið er stovnað í 1969 og hevur til endamáls at savna fólk saman til góðan føroyskan dans og stimbra áhugan fyri dansinum. Limatalið er u.l. 110, og vanlig kvøld eru vit 25 – 40 fólk í dansi.*